# Tyrlan er ómissandi á útoyggj

**- Hvussu ætlar landsstýrið at tryggja eitt nøktandi tænastustøði í samband við tyrluflúgving til útoyggjarnar í framtíðini?, spyr tingkvinnan Olga Biskopstø. Hon hevur nú sett Helenu Dam á Neystabø fyrispurning um hetta málið**



*- Uttan tyrluna var lítið virksemi á útoyggj. Neyðugt er tí at vita, hvussu verður við hesi flúgvingini í framtíðini, vísir Olga Biskopstø, tingkvinna á*

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Tingið:** - Uttan tyrluna høvdu útoyggjarnar verið púrasta avskornar frá meginøkinum ein stóran part av árinum, sigur tingkvinnan í fyrispurningi sínum.

Olga Biskopstø er ein teirra, sum veit mest um umstøðurnar á útoyggj, eftir drúgva arbeiðið sítt sum samskipari í Útoyggjafelagnum.

Nú hevur hon møguleika fyri beinleiðis ávirkan á hesar umstøðurnar, sum partur av samgonguni. Og hesin fyrispurningurin er bert eitt stig á hesi leiðini.

Við fyrispurningi sínum ynski hon tí at fáa greitt at vita, hvørjar skyldur Atlantsflog hevur at røkja tyrluflúgving til útoyggjarnar.

- Tað hevur eisini áhuga at vita, hvør ásetir ferðaseðlagjaldið og farmagjaldið í hesi flúgvingini. Og fyriliggur nøkur ætlan um at lækka hesar prísirnar?, spyr tingkvinnan í fyrispurningi sínum til landstýriskvinnuna í løgmálum.

Fyrispurningurin varð settur fram í farna mánaði, og samtykt er at hann skal svarast. Á tingfundi hósdagin verða onkrir skrivligir fyrispurningar svaraðir, men enn er ógreitt um hesin er teirra millum.

### Rinda ikki raksturin

Í viðmerkingum sínum til fyrispurningin vísir Olga Biskopstø á, at tað eru sera fáar samfelagstænastur og almennar heilsutænastur á útoyggj.

- Hetta ger, at tørvurin á at ferðast inn á meginøkið at leita sær heilsubót, fara til lækna, tannlækna, banka og at keypa er samsvarandi stórur.

- Ferðaseðla- og farmakostnaður hevur tí sera stóran týdning fyri húsarhaldið og møguleikarnar at liva og virka á útoyggj, sigur hon.

Nógv er hent tey seinastu árini við ferðaprísinum í Føroyum, og nógv ferðast bíligari enn nakrantíð til og frá arbeiði.

Men hóast hetta noyðast útoyggjafólk at gjalda úr 290 og niður í 170 krónur aftur og fram, tá tey skulu inn á meginøkið.

- Hóast henda høga prísin, so eru tað ikki hesi útoyggjafólk, sum halda rakstrinum av tyrluni uppi, tí inntøkan, sum Atlantsflog fær burtur úr ferðaseðlasøluni, liggur um 50.000 krónur um árið.

Ferðaætlan og ferðaseðlaprísirnir hjá tyrluni, eru ikki broyttir nevnivert, síðan tyrlan byrjaði sína flúgving. Øll hesi árini hava útoyggjafólk goldið ein sera høgan kostnað fyri tænastuna, sæð í mun til, hvat fólk á meginøkinum gjalda fyri flutning til at røkka neyðugum samfelagstænastum.

- Nú einskiljingin av Atlantsflogi og har við Tyrlutænastuni er byrjað, er tað sera umráðandi at fáa greiðu á, hvussu henda tænasta verður skipað í framtíðini, bæði viðvíkjandi skyldum og tænastum, vísir tingkvinnan á.

## Fara nú at byggja bókasavn

**Sandur:** Á seinasta bygdarráðsfundi á Sandi varð samtykt at byggja bókasavn í bygdini.

Bókasavnið verður umleið omanfyri 320 fermetrar til støddar, og fer Articon at byggja savnið.

Allir bygdarráðslimirnir tóku undir við málinum. Bókasavnið verður bygt uppí verandi bygningin hjá bygdaráðnum, og skal arbeiðið verða liðugt í desember mánaði í ár.

Bókasavnið á Sandi hevði ikki verið veruleiki, uttan framúr góðu gávuna frá Daniellu Olsen, og tað góða samstarv sum verið hevur millum, Daniellu Olsen, Landsbókasavnið, JP Gregoriussen, arkitekti, Mentamálaráðið og Sands Kommunu.

Bókasavnið verður gjørt eftir tekning av arkitektinum J. P. Gregoriussen, og var hann sjálvur við á fundinum í bygdaráðnum.

Tað var eisini hann, ið teknaði snotuliga Listasavnið í bygdini.

**sb.**

# Íverkseting er komin fyri at verða

**Mikudagin var fyrsti ársfundurin í hjá stjórnini og nevndini í Grunninum Íverksetarahúsið í Klaksvík hildin**

ÍVERKSETING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Vit ynskja at halda fram og at menna verandi virksemið enn meiri, varð staðfest á ársfundinum.

Dentur varð somuleiðis lagdur á, at skjøtul má setast á fleiri nýggjar verkætlanir, sum nú verða raðfestar og settar inn í ein realistiskan tíðarkarm.

- Higartil í ár hevur undirtøkan hjá Íverksetarahúsinum millum íverksetarar og fólki við áhuga fyri íverksetan verið munandi betur enn í 2007.

- Tað er tí í góðum treysti, at vit framhaldandi fara at taka við nýggjum avbjóðingunum, til frama fyri íverksetan og innovatión í føroyska samfelagnum, varð víst á.

Allir nevndarlimirnir - Kitty May Ellefsen, Eyðun Mørkøre og Torben Hendriksen - halda fram.



*Íverksetarahúsið er komið fyri at verða, staðfestu leiðarin í Íverksetarahúsinum, Rani Nolsøe (triðuttast høgrumegin í aftara raði) saman við skeiðsluttakarum og fyrilestrarhaldarum*

*(mynd: klaksvik.fo)*